# TILTØK

**Gudstænastur Dýra biðidag**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Heri Joensen
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Jóannis Fonsdal
***Nólsoy:*** kl. 12, Sonja Klein
***Kollafjørður:*** kl. 11 Konfirmatión, Marjun Bæk
***Kvívík:*** kl. 12 (sjónvarps-upptøka), Mogens Tilsted Christensen. ***Í Vestmanna, Hósvíkar, Hvalvíkar, Haldarsvíkar og Tjørnuvíkar kirkjum gongur talvan fyri Guðs orðs boðan***.
***Gjógv:*** kl. 12, messa Emil Olsen
***Norðskála:*** kl. 12, Sverri Steinhólm og Pól Johannesen, trúboðari
***Fuglafjørður:*** kl. 11, Uni Næs. Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri Guðs orðs boðan
***á Húsum:*** kl. 11,
***í Mikladali:*** kl. 12.30 Hans Eiler Hammer
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Lestur
***Christianskirkjan:*** kl. 18 Forbønarguðstænasta
***Fámjin:*** kl. 11,
***Øravík:*** kl. 12, Jónsvein Bech
***Sandvík:*** kl. 18 Jónsvein Bech
***Vágs kirkja:*** kl. 11,
***Eldrabýlið:*** kl. 13, Patrick de Neergaard

**Gudstænastur 4. sunnudag eftir páskir**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Heri Joensen
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Sverri Steinhólm
***Nólsoy:*** kl. 12, Sonja Klein, konfirmatión
***Kvívík:*** kl. 12, konfirmatión, Marjun Bæk
***Hvalvík:*** kl. 12, Mogens Tilsted Christensen
***Norðskála:*** kl. 11.40 Skriftamál, kl. 12 Messa Carl P. Behrens og Emil Olsen
***Gásadalur:*** kl. 11, altarg., David Johannesen
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, Erland Beder
***Funnings kirkja:*** kl. 12, Elsa Funding
***Leirvík:*** kl. 12, Uni Næs
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Hans Eiler Hammer
***Húsavík:*** kl. 12, Jákup R. Hansen
***Tvøroyri:*** kl. 11 (útvarpað) Jónsvein Bech
***Porkeri:*** kl. 11,
***Leiti:*** kl. 12.30, Patrick de Neergaard

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Fríggjadag kl. 11 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Michael Bradley, prestur, í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15 til kl. 18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. Øll eru vælkomin.
www.katolsk.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og møti, Jørgen Dahl talar.
www.hebron.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygardagin kl. 13-17 »Salt skeið – fjórða trin – tilbiðjan úti og heima«.
Sunnumorgunin kl. 10.30 á Familjumøtinum er evnið »Nær byrjar lívið?«.
Kl. 11.30 samvera við drekka. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 er evnið »Trúfesti Guds«, talari verður Jógvan Z. Barnaansing undir møtinum.
Sunnudagsskúlin kl. 12.
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.
www.livdin.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Dýra biðidag kl. 18 Møti v/ Martin Thomsen. Einki møti sunnukvøldið.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18 Evangel. Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Oljukrukkan (kvinnumøti).
www.gospel.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudag kl. 11 Møti. Eingin sunnudagsskúli, men familjumøti kl. 17. Drekkamuður aftaná.
www.frelsunarherurin.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin kl. 20 í KFUM: Kafé-kvøld fyri ung. Dýribiðidagur.
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Regini Høgnesen, trúboðara.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 6 Morgunbøn, kl. 20 Flare.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC – evnið er: »Títt profetiska lív« 1. partur við Hildibrandur Olsen, kl. 16 Samkomufundur.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. www.filadelfia.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*uppi á Brekku 3*
Dýra biðidag kl. 10-12 verður biðið fyri meinigheitini.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Eyðun Zachariasen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn. Verið hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Regin Olsen.

**Frá Ebenezer**
Fríggjadag/Dýri biðidagur kl. 18 Evangel. møti.
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Bíbliugransking, Barnabíbliutími, kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Evangel. møti í Norðradali**
Fríggjakvøldið kl. 20, leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18 verða evangel. møti við nógvum sangi og vitnisburðum í Norðradali. Talarar Palli Højgaard og David Beck. Sangur: Herman og Gigga, Julius, Tórmund og fleiri.

**Zion, Kollafjørður**
Ungdómsmøti leygarkvøldið 23. apríl kl. 20 við luttøku úr Gøtu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin verður morgunmøti við breyðbróting og barnavælsignilsi kl. 11, Sveinbjørn Jakobsen talar.

**Filadelfia, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Dýrabiðidagsstevna í Vágunum**
Dýrabiðidag kl. 20 og leygarkvøldið kl. 20 Møti í Bygdarhúsinum í Miðvági.
Sunnudagin kl. 18 Møti í Missiónshúsinum í Sørvági.
Hesi luttaka við talu, sangi og vitnisburði: Jógvan Lamhauge, Hedvig og Hallmar Winther, Hjalgrim Davidsen, Thomas J. Askham, Trioin í Soli Deo Gloria, Magda og Meibritt, Streingjakórið í Vágunum og fl. Øll eru vælkomin til stevnuna.

**Ársmøti hjá Kirkjuligu Heimamissiónini**
Fríggjadagin kl. 12 Gudstænasta í Norðskála kirkju v/ Sverra Steinhólm.
Prædika: Pól Johannesen.
Innsetan og forbøn fyri Jørmund Foldbo og David Dalbø. Innsavnan til útimissión,
kl. 14.30 Pallborðsfundur við orðaskifti. Evnið: Hvussu samansjóða vit Heimamissiónina.
Panel: Hilda Viderø, Laila Højgaard, Thomas Dam og Christian Joensen.
Kl. 19.30 Møti. Evnið: Vit fingu eini gleðiboð at hoyra.
Tala: Alfred Olsen.
Sangur: Gratia. Innsavnan til Heimamissiónsungdóm.
Kl. 21 Drekka.
Kl. 22 Vitniløta.
Andakt: Annika Nattestad.
Lovsangsbólkur luttekur.
Leygardagin kl. 10 Sangløta við lovsongsbólki, kl. 10.45 Áhugatímar, kl. 14 Frágreiðing frá arbeiðinum, kl. 20 Møti, kl. 21.15 Drekka, kl. 22.30 Café við livandi tónleiki.Andakt: Suni Justinussen
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta v/ altargongd, kl. 15 Familjumøti, kl. 16.30 Drekka, kl. 18 Møti við fríum vitnisburði. Harafturat er serstøk skrá til børnini hvønn dag.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Rebekku R. Petersen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Barnamøti kl. 17.
www.keldan.fo

**Nerija á Skála**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við sangkórinum í Betesda í Klaksvík. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Lívsins Orð**
*Saltangará*
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/ Lindu Højgaard.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Elim í Søldarfirði**
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Á møtinum kl. 18 verður luttøka við Siloa kórinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Dýrabiðidag einki møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.30. Einki møti kl. 18 vegna ársmøti í Nesvík. Ungdómsmøti kl. 21 við Suna Justinussen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti, kl. 21 Ungdómsmøti. www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Preben Hansen.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.

Sunnudagin kl. 18 Familjumøti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Leygarkvøldið kl. 19 Ungdómsmøti, tær ungu syngja.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 19 kemur ungdómurin saman.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Tove og Signheðin. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Salem, Tvøroyri**
Á fundinum sunnudagin kl. 18 luttekur sangkórið.

**Bethel, Vágur**
Á fundinum Dýrabiðidag kl. 18 luttekur sangkórið.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Fríggjadagin – Dýra biðidag kl. 18 Møti. Streingjakórið syngur. Magnus Jensen talar.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, Streingjakórið syngur. Sigrid Ludvig talar. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Um Gud vil byrjar missiónsvikan tann 26. og vikuna út.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30.
Mikukvøldið 4. mai kl. 20.30 verður hugnakvøld við Marjun Bæk.
Kristi Himmalsferðardag kl. 13.00 verður føroysk gudstænasta í Háteigskirkju, Marjun Bæk prædikar. Aftaná verður boðið til kaffi á Sjómansheiminum.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 24. apríl verður gongutúrur frá Tíggjará-Føroya miðdepil-oman Hórisgøtu. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæðir og ein matpakka við. Túrurin er tungur og varðar góðar fýra tímar. Tilmelding.

## BRÚDLEYP

Hósdagin 21. apríl *giftust* í Vesturkirkjuni Bette Johansen og Arnfinnur Jacobsen, Tórshavn.

## KONFIRMATIÓN

Sunnudagin 1. mai verður Sólfríð Hansdóttir, dóttur Joan Juul Poulsen úr Havn og Hans Sivertsen av Argjum konfirmerað í Viborg Dómkirkju. Dagurin verður hildin á Fuglevænget 7 í Mønsted.

Sunnudagin 1. mai verður Kjartan Eli Knudsen, sonur Elsu Knudsen og Hjalmar Ingebrigtsen, konfirmeraður í Bryndum Kirkju. Adr.: Marken 4, Tarp, 6715 Esbjerg N.

Sunnudagin 1. mai verður Randi Holm Johannesen, Rolf Krakes Vej 36, 5200 Odense V, dóttur Rúnu Holm og Boga Johannesen, konfirmerað í Bolbro kirkju í Odense.

Rita Gunnarsdóttur Dam (dóttur Gunnar Hákun Dam og Hansinu Madsen) verður fermd tann 1. mai í Bindslev Kirkju.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Eg eri lívsins breyð. Tann, sum kemur til mín, skal ikki hungra, og tann, sum á meg trýr, skal aldri tysta!«*
*(Jóhs. 6,35)*

Tað er Jesus, sum sigur hetta um seg sjálvan. Jesus er matur og drekka okkara. Hann er okkara grundvøllur. Vit hava ikki bara tímiligheit ella dagligt breyð fyri neyðini. Vit hava eisini andligt breyð fyri neyðini. Jesus segði jú einaferð, menniskjan livir ikki av breyði eina, men av hvørjum orði, ið gongur út av Guds munni. At fáa eyga á henda veruleika er sannur lívsvísdómur.

Trúgvin sær henda veruleika í eyguni. At trúgva er at síggja, at Jesus ikki bara hevur sagt sannleikan til okkum, men tað er at síggja, at hann er sjálvur sannleikin til okkum. Hann er við øðrum orðum lívsins breyð. hann er okkara tilverugrundarlag. Og tann, sum trýr á hann, skal hvørki hungra ella tysta. Tað er at eiga lívið og tað er at eiga framtíðina. Hetta lívsins breyð fáa vit á serligan hátt við altarborðið. Har verður sagt, hetta er likam mítt og hetta er blóð mítt til fyrigevingar syndanna. Vit faá Jesus sum frelsara við Harrans borð. Har fáa vit allan Jesus og tað, hann og gerningur hansara merkja. Vit fáa lív og sælu. Trúgvin kemur aftrat og tekur ímóti. Tí uttan trúnna gagna sakramentini ikki. Vit prædika ikki bara sakramentir, heldur ikki bara trúgv, men vit prædika sakramentir og trúgv. Bæði hoyra saman, um vit skulu prædika ta heilnæmulæruna.

Jesus er lívsins breyð. Hann gevur seg sjálvan til okkum. Orðið um krossin sigur okkum hetta og gevur okkum hetta. At trúgva er at gera frelsunnar gávu til sína gávu. Og tað er at liva við Jesus hvønn dag, alt til harrans dag. Tað er at lata seg sannføra til trúgv, kærleika og vón hvønn dag. Tað er við øðrum orðum at móttaka Guds góðu gávur og geva tær víðari í tí samanhangi, vit liva sum kristin. Men framum alt eru lívið og frelsan gávur frá Gudi til okkara og vit eiga hesar gávur bert við at geva tær til næstan dag og dagliga. Takka Gudi tínum fyri lívsins og frelsunnar gávur, tí tað er at trúgva!

Amen

**David Johannesen**